Jólaborðhaldsárstíðin byrjaði friðarliga

LØGREGLUTÍÐINDI

Nú komið er út í november mánað eru jólaborðhaldini longu byrjað. Hetta plagar at síggjast aftur í døgnrapportini hjá løgregluni, men um farna vikuskiftið verður sagt av politistøðini í Havn, at tað var av teimum allar friðarligastu. Nakrir fáir brotnir rútar ymsastaðni vóru grovastu herverkini løgreglan í Havn hevði at taka sær av millum friggjakvøld og sunnumorgun.

Løgreglan í Havn var sum vant jólaborðhaldskvøld úti og hugdi at teimum, sum koyrdu heim eftir borðhaldini, men eingin varð tikin fyri at koyra ávirkaður.

Allan november mánað hevur løgreglan verið serliga nógv úti á vegunum í einum sokallaðum ferðsluátaki, ið serliga hevur til endamáls at kanna, um lyktirnar á bilunum lýsa rætt. Fyrsta dagin vórðu ikki so fáir bilar steðgaðir við ólagi á lyktunum, men nú løgreglan hevur verið nógv at sæð, tykjast bilførarar hava syrgt fyri at kanna og umvæla lyktirnar á bilum sínum, verður sagt av løgreglustøðini í Havn.

Í Klaksvík var so friðarligt um vikuskiftið, at tað sambært løgregluni har ikki er komið nakað í døgnrapportina, sum hevur almennan áhuga. Eisini í Klaksvík hava teir dúgliga kannað lyktir seinastu dagarnar og latið nakrar bøtur frá sær til bilførarar í illa lýsandi bilum.

Á løgreglustøðini í Runavík er døgnrapportin fyri vikuskiftið eitt blankt pappír.

-jm

Nýggjur lækni til Klaksvíkar

Vil hava ordan í tingunum

- Eg kenni meg væl móttiknan og gleði meg at fara til verka sum kommunulækni í býnum. Men at koma til eina tóma læknastovu, har øll amboð og alt neyðugt medicin skal fáa til vega av nýggjum, er ikki heppið fyri læknadømi, sigur 33 ára gamli Christian Macshmann

- Eg havi helst nakað av týskari perfektionismu við mær. Og eg má viðganga, at tað eru nógv viðurskifti her í býnum, sum eg vildi ynskt vóru øðrvísi

Mynd: Bárður Lydersen

KOMMUNULÆKNI
Steintór Rasmussen

Nýggi læknin sum er settur at røkja triðja læknastarvi í Klaksvík er so smátt farin til verka. Hann hevur haft sína fyrstu vaktir um vikuskiftið og alla síðstu viku stríddist hann við at innrætta hølini, sum vóru púra skralladi fyri øll tól, sum hava við læknaarbeiði at gera.

- Tað var óneyðuga tung at byrja. Sjálv konsultatiónin og læknataskan skuldi verið klár áðrenn læknin kom á staðið, sigur Chritian Macshmann, sum leggur afturat, at tað hevur kortini ikki skorta uppá góðan vilja frá Klaksvíkar Kommunu og Sosialu Deild í býnum, sum á bestan hátt hava roynt at fáa alt til vega, sum nýsetti læknavikarurin hevði tørv á.

Valdi Klaksvík framum Norra

Hóast nýggi lækni einans er 33 ára gamal, so hevur hann drúgvar royndir og verið víða um í útbúgvingarørindum og í starvandi praksis. Næstu fýra mánaðirnar skal hann røkja starvið sum kommunulækni í Klaksvík og hetta tekur hann sum eina avbjóðing.

- Eg varð biðin av um søkja starvið og eg visti so nøkulunda hvat eg kom til. Annars var boð eftir mær í Norra, men eg helt at tað var meira spennandi at koma til Klaksvíkar. Eg havi verið í Føroyum áður, og eg haldi at landið er vakurt og fólkini vinarlig, sigur Macshmann.

Hóast læknin er týskari, so tosar hann flótandi dansk. Hann viðgongur á ein lítillátnan hátt at hann allarhelst hevur eitt gott máloyri, men seinastu trý árini hevur hann mest verið í starvi í Norðurlondum. Seinast í Vesturnoregi nærhendis Bergen.

Tingini skulu rigga

- Eg havi helst nakað av týskari perfektionismu við mær. Og eg má viðganga, at tað eru nógv viðurskifti her í býnum, sum eg vildi ynskt vóru øðrvísi. Sjálvur havi eg havt vaktini um vikuskifti og tað hevur verið ein frægari uppgáva at finna runt í Klaksvíkini, eitt nú tí at býurin er so illa uppmerktur. Nøgvastaðni eru ongi húsaskelti og summar gøtur er illa upplýstar. Tað kann ljóða banalt, men hjá einum lækna sum hevur bæði tíðina og sjúkur at kempa ímóti, so mugu slík viðurskifti vera í lagi.

Christian Macshmann heldur eisini, at tað er óheppið at skipanin við journalum og upplýsingum um sjúklingarnar er so avmarkandi sum hon er.

- Tað kann ikki verða rætt, at ein nýggjur lækni skal leita og finna nýggjar upplýsingar fram fullkomiliga av nýggjum, tá ein journalur finst til flestu sjúklingarar. Tað gevur bert læknum, sum frammanundan hava ríkiligt at gera, eyka arbeiði.

Vil fegin steðga longri

Nýggi læknin í Klaksvík hevur fyribils játtað at vikariera í Norðoyggjum fyribils í fýra mánaðir. Aftaná tað er hann sáttmálabundin til eitt starv í SuðurAfrika í tríggjar mánaðir. Men hvat síðani hendir er rættuliga opið.

- Eg vil fegin síggja eina meining í tí sum eg fáist við í lívinum. Og soleiðis er eisini við starvinum í Klaksvík. Týskil er tað ikki óhugsandi at eg seinni komi aftur hendanvegin, sigur Christian Maschmann, sum um tvey til trý ár kann síggja fram til eina útbúgving narkosulækni.

Landið má taka ábyrgd

Vinnuhúsið kann undir ongum umstøðum góðtaka eina Barsilsskipan, har landið ikki rindar sín part. Bjørgfríð Ludvig sigur vegna Vinnuhúsið, at landið skal halda sínar skyldur mótvegis skipanini, og hon fýlist á, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki fáa neyðuga skotbráið at viðgera broytingar við Barsilsskipanini

Sambært fíggjarlógaruppskotinum skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir gjalda fyri Barsilsskipanina í framtíðini. Hetta góðtekur Vinnuhúsið ikki, og sigur, at landið hevur skyldu til at rinda pening í skipanina.

Mynd: Baby

BARSILSSKIPANIN
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Felagið fyri privatu arbeiðsgevararnar, Vinnuhúsið, kann als ikki taka undir við ætlaðu broytingunum við Barsilsskipanini. Sambært fíggjarlógaruppskotinum mælir samgongan til, at Barsilsskipanin skal hvíla í sær sjálvum, ella sagt við øðrum orðum, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu einsamallir fíggja skipanina í framtíðini.

Landið hevur seinnu árini rindað góðar 25-30 árliga í Barsilsskipanina, meðan partarnar á arbeiðsmarknaðinum hava í felag rindað um somu upphædd.

Játtanin til Barsilsskipanina komandi ár er 52,5 mio krónur, og partarnar á arbeiðsmarknaðinum skulu sambært fíggjarlógaruppskotinum fíggja tær 52, 5 mio. krónurnar einsamallir.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava goldið 29 mio. krónur til Barsilsskipanina í ár, so er talan um eina munandi tyngri byrðu hjá arbeiðsmarknaðinum, um fíggjarlógaruppskotið verður samtykt.

Fíggjarlógaruppskotið leggur upp til, at inngjaldið til Barsilskipanina frá hvørjum av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum hækkar úr 0,25% til 0,4%

Halda skyldina

Bjørgfríð Ludvig sigur vegna Vinnuhúsið, at Føroya Arbeiðsgevarafelag kann ikki taka undir við fíggjarlógaruppskotinum.

Vinnuhúsið fýlist á, at landsstýrið ikki heldur sínar skyldur mótvegis Barsilsskipanini, sum tað hevur gjørt higartil.

Barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001, tá dagpengaskipanin og almenni barsilsgrunnurin vórðu lagdir saman í eina skipan. Landið hevur síðan rindað 25 mio krónur árliga, men henda upphædd frá landinum dettur sambært uppskotinum burtur.

Tað er eisini ein sannroynd, at skipanin komandi ár verður væl dýrari enn hon hevur verið farnu árini, og tað kemur sum steinur á byrðu hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

– Tað verður ógvuliga tungt hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, at vit fyrst skulu rinda fyri skipanina einsamallir og harumframt, at skipan verður dýrari. Tað góðtaka vit ikki, sigur Bjørgfríð Ludvig.

Hon rør frammundir, at landsstýrið hevur skyldu til at rinda sín part í skipanina. Ger landsstýrið ikki tað, so verður Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki sinnað at viðgera nakrar broytingarnar við Barsilsskipanini. Skal Barsilsskipanin viðgerast av nýggjum, er neyðugt, at partarnir á Arbeiðsmarknaðinum fáa neyðuga skotbráið, sigur Bjørgfríð Ludvig.

Hon heldur tað er óheppið, at umfatandi broytingar við skipanini verða gjørdar í skundi, uttan at partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava fingið neyðugu tíðina at viðgera broytingarnar.

Vit hava roynt at fingið fatur á Ingeborg Vinther til eina viðmerking um Barsilsskipanina, men tað eydnaðist ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Tímaløntu harðast rakt

Sambandsflokkurin tekur ikki við uppskotinum hjá Barsilsskipan hjá Vinnumálaráðnum. Flokkurin heldur ikki tað verða rætt, at tað aftur verður lagt eftir teimum lægstløntu.

BARSILSSKIPANIN
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Størsti andstøðuflokkur, Sambandsflokkurin, tekur eins og Tjóðveldisflokkurin ikki undir við ætlaðu broytingunum hjá Bjarna Djurholm við Barsilsskipanini komandi ár. Sambandstingmaðurin og formaðurin í trivnaðarnevndini, Alfred Olsen, sigur, at flokkurin góðtekur ikki broytingaruppskotið.

Flokkurin metir, at skipanin hevur síðan, hon kom í gildið, bara versnað um viðurskiftini hjá teimum tímaløntu, og uppskotið hjá Bjarna Djurholm hevur ongar ábøtur við sær- heldur tvørturímóti.

-Øll tey fastløntu hava kunnað kent seg trygg við skipanini, men verri er við teimum tímaløntu. Tey verða aftur hart rakt, og tað góðtaka vit ikki. Tað er ikki rætt, at tey lægstløntu aftur fara at standa við svíðið soð, sigur Alfred Olsen.

Hann leggur afturat, at uppskotið hjá Vinnumálaráðnum leggur upp til, at Barsilsskipanin í framtíðini verður ein samanvevstur av eini arbeiðsmarknaðar- og sosialari skipan, og henda blanding er ikki heppin. Barsilsskipanin eigur at verða varðveitt sum ein arbeiðsmarknaðarskipan, heldur sambandstingmaðurin.

Øll tey fastløntu hava kunnað kent seg trygg við Barsilsskipanini, men verri er við teimum tímaløntu. Tey mugu aftur svíðja, og tað góðtaka vit ikki, sigur Alfred Olsen um uppskotið hjá Vinnumálaráðnum

Mynd: Jens Kristian Vang

Sambandsfólk á aðalfundi hjá Vinstra

AÐALFUNDUR
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Alfred Olsen og Lisbeth Petersen hava um vikuskiftið verið á árliga landsfundinum hjá Vinstra. Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, heldur fast við, at føroyingar kunnu sjálvir avgera, um teir vilja úr ríkisfelagsskapinum

Størsti flokkur í Fólkatinginum, Vinstri, hevði um vikuskiftið sín árliga landsfund. Seinastu mongu árini hevur Vinstri havt tætt samband við føroyska Sambandsflokkin, og tvey umboð úr Føroyum vóru eisini boðin við á fundin. Umboð fyri ein av grønlendsku flokkunum var eisini við á landsfundinum. Úr Føroyum vóru fólkatingslimurin og floksformaðurin, Lisbeth L. Petersen og tingmaðurin, Alfred Olsen, umboðað.

Vit fingu orðið á Lisbeth Petersen úr Danmark, og hon greiddi frá, at fundurin var rættiliga áhugaverdur.

–Stóra kjakevnið var kommunala økið. Kjakast varð um, hvussu ein møgulig umskipan av kommunala økinum skal fremjast, og serliga lokalu vinstrapolitikkararnir gjørdu um seg. Kjakið var rættiliga áhugavert, og relevant fyri føroyingar, sigur Lisbeth Petersen.

Seinnu árini hava fleiri røddir verið um, at donsku amtini eiga at niðurleggjast, so at uppgávurnar í amtunum verða givnar til kommunurnar, so avgerðirnar koma nærri borgaranum.

Sama støða

Á landsfundinum hjá Vinstra er vanlig mannagongd, at bæði grønlendsku og føroysku umboðini sleppa at siga nøkur á røðarapallinum, og so var eisini í ár.

Floksformaðurin Anders Fogh Rasmussen greiddi frá, at hann er framvegis sannførdur um, at avgerðin um føroyskt sjálvsstýri liggur í Føroyum og ikki í Danmark. Sum skilt á føroysku umboðunum á landsfundinum, so varð ríkisfelagsskapurin ikki nógv umrøddur hesaferð.